**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)

Svimjisamband Føroya bjóðar hervið til

# Føroyameistarastevnu og Juniormeistarastevnu á langgeil 2026 (50m)



**Dagfesting**: **5. - 7. juni 2026**

**Svimjihøll**: Svimjihøllin í Gundadali, 10x50m innandura svimjihylur

**Adressa**: Gundadalur 4, FO-100 Tórshavn, svimjihollin.fo

**Luttakarar**: JM: Allir svimjarar við føroyskum svimjitjóðskapi sum hava junioraldur, tvs. øll sum fylla ml. 15 og 18 ár í kalendaraárinum.
FM: Allir svimjarar við føroyskum svimjitjóðskapi sum frá og við seinasta FM á langgeil hava klárað kravtíð í viðkomandi grein á stuttgeil ella langgeil.
Sí yvirlit yvir kravtíðir, og annars Reglugerð fyri Meistarastevnur

**Innboðin feløg**: Svimjifelagið FLOT, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Neptun,

**í samstarvi við**

ATLANTIC AIRWAYS

Svimjifelagið Reysti, Suðuroyar Svimjifelag, Ægir, Svimjifelagið Hellufossur

| | |
|---|---|
| **Mikudag 6. mai 2026**<br>(30 dagar áðrenn stevnu) | **Formlig innbjóðingarfreist** |
| **Fríggjadag 22. mai 2026 kl 06:00**<br>(14 dagar áðrenn stevnu) | **Rættstundis tilmeldingarfreist**<br>(kr 25/start hjá einstaklingum, kr 100/start hjá liðsvimjingum) |
| **Leygardag 23. mai 2026**<br>(13 dagar áðrenn stevnu) | Feløgini fáa lista við sínum egnu tilmeldingum |
| **Hósdag 28. mai 2026**<br>(8 dagar áðrenn stevnu) | **Síðsta freist at senda dómaralista til SSF** |
| **Fríggjadag 29. mai 2026 kl 06:00**<br>(7 dagar áðrenn stevnu) | **Seina tilmeldingarfreist**<br>(kr 100/start hjá einstaklingum, kr 100/start hjá liðsvimjingum)<br>Síðsta freist at senda dómaralista til World Aquatics |
| **Leygardag 30. mai 2026**<br>(6 dagar áðrenn stevnu) | Feløgini fáa rokning fyri sínar tilmeldingar |
| **Týsdag 2. juni 2026**<br>(3 dagar áðrenn stevnu) | **Gjaldsfreist at gjalda fyri tilmeldingar** |
| **Mikudag 3. juni 2026**<br>(2 dagar áðrenn stevnu) | **Almannakunngering av startlista** |
| **Hósdag 4. juni 2026**<br>(1 dag áðrenn stevnu) | **Síðsta frámeldingarfreist**, til kappingar aðrar enn FM-finalur |
| **Fríggjadag 5. juni 2026**<br>(Fyrsti stevnudagur) | |

## Stevnupartar - Gevið gætur at JM verður avgreitt í morgunriðlunum !

| | |
|---|---|
| 1. partur: | **Dagur 1 frá kl 09:30** - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 2. partur: | **Dagur 1 frá kl 17:00** - FM finalur |
| 3. partur: | **Dagur 2 frá kl 09:30** - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 4. partur: | **Dagur 2 frá kl 17:00** - FM finalur |
| 5. partur: | **Dagur 3 frá kl 08:30** - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 6. partur: | **Dagur 3 frá kl 14:00** - FM finalur |

Hølllin letur upp til upphiting 1½ tíma áðrenn hvønn stevnupart, dag 3 tó 1 tíma áðrenn.

Svimjararnir skulu upp úr kappingarhylinum 10 min. áðrenn viðkomandi stevnupartur byrjar.

## Tekniskir fundir

Tekniskur fundur fyri dómarar er í svimjihøllini 1 tíma áðrenn hvønn stevnupart

Tekniskur fundur fyri venjarar er í svimjihøllini 1½ tíma áðrenn fyrsta stevnupart

## Kappingarskrá

| **Dagur 1** | **Dagur 2** | **Dagur 3** |
|---|---|---|
| 1. 800m frí kvinnur*<br>2. 1500m frí menn*<br>3. 200m bringa kvinnur<br>4. 200m bringa menn<br>5. 100m firvald kvinnur<br>6. 100m firvald menn<br><br>Steðgur<br><br>7. 4x100 frí mix<br>8. 200m blandað kvinnur<br>9. 200m blandað menn<br>10. 50m rygg kvinnur<br>11. 50m rygg menn<br>12. 200m frí kvinnur<br>13. 200m frí menn<br><br>Steðgur<br><br>14. 4x100m blandað kvinnur<br>15. 4x100m blandað menn | 16. 400m frí kvinnur<br>17. 400m frí menn<br>18. 50m firvald kvinnur<br>19. 50m firvald menn<br>20. 100m rygg kvinnur<br>21. 100m rygg menn<br><br>Steðgur<br><br>22. 4x100 blandað mix<br>23. 100m bringa kvinnur<br>24. 100m bringa menn<br>25. 100m frí kvinnur<br>26. 100m frí menn<br>27. 400m blandað kvinnur<br>28. 400m blandað menn<br><br>Steðgur<br><br>29. 4x200m frí kvinnur<br>30. 4x200m frí menn | 31. 1500m frí kvinnur*<br>32. 800m frí menn*<br>33. 200m firvald kvinnur<br>34. 200m firvald menn<br>35. 50m frí kvinnur<br>36. 50m frí menn<br><br>Steðgur<br><br>37. 200m rygg kvinnur<br>38. 200m rygg menn<br>39. 50m bringa kvinnur<br>40. 50m bringa menn<br><br>Steðgur<br><br>41. 4x100m frí kvinnur<br>42. 4x100m frí menn |

* Kappingarnar í 800 og 1500 frí verða avgreiddar sum beinleiðis finalur um morgunin

Um meira enn 1 riðil er í 800 og 1500, so svimur bert skjótasti riðil beinleiðis finalu um kvøldið

ATLANTIC AIRWAYS

## JM og FM í senn og fyri seg

Hesar báðar meistarastevnur verða avgreiddar í senn í morgunriðlunum, so at Juniormeistararnir verða funnir um morgunin, umframt finalistarnir til FM seinnapartin. Eingin kravtíð er til JM, men JM-svimjarar mugu tó sum hini hava klárað FM-kravtíð í greinini, til at kunna luttaka í FM-finalu.

Heiðursmerkjahandanin hjá juniorum verður avgreidd um morgunin.

## Stjórn á stevnuni

Kappingarleiðari er Ian Salter og stevnuskrivari ??.
Yvirdómari er Rúni Gaardbo, Katja Lervig og Rakul á Lágabø. Startarar John D. Olsen, Eliesar Lydersen og Dan Eliasen.

## Dómarar

Føroysku feløgini skulu møta við fylgjandi fólki til uppgávurnar sum tíðtakarar, vendidómarar og svimjidómarar: HS, SuSvim og Ægir 5 fólk til hvønn stevnupart; FLOT, FS, Reysti, Hellifossur og Neptun 2 fólk til hvønn stevnupart. Nøvnini skulu sendast til ssf@ssf.fo í seinasta lagi til ásettu síðstu freist at senda inn dómaralista til SSF.

## Tilmeldingar

Tilmeldingarfíla í Grodan-sniði verður løgd á data.tempus.fo í seinasta lagi til formligu innbjóðingarfreist. Tilmeldingar eiga at gerast á data.tempus.fo til ásettu rættstundis tilmeldingarfreist.

Hvørt felag fær dagin eftir rættstundis tilmeldingarfreist sínar tilmeldingar aftur sum innlisnar í stevnuforritið, at kanna og um neyðugt rætta. Seinar tilmeldingar kunnu gerast á data.tempus.fo fram til seinu tilmeldingarfreist, tá ið læst verður endaliga fyri tilmeldingum og møguligum útskiftingum.

Loyvt er svimjarum ið hava klárað eina kravtíð, at melda seg til allar kappingar á 100m og styttri á stevnuni. Tó skal ein tilmeldingartíð til, ið er svomin innan 12 mánaðir.

**Liðkappingar** - Luttakandi svimjari í eini liðkapping skal hava klárað kravtíð. Tó er einki áramark nær hendan kravtíðin varð rokkin.

## Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr 25 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 100 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til rættstundis tilmeldingarfreist. Aftaná tað er luttøkugjaldið kr 100 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 400 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til seinu tilmeldingarfreist.

SSF ger dagin eftir seinu tilmeldingarfreist upp luttøkugjøld fyri svimjarar og liðsvimjingar hjá feløgunum, til felagið at gjalda í seinasta lagi til ásettu gjaldsfreist, við bankaflyting til Svimjisamband Føroya á konto 6460 - 151.845.5 í BankNordik.

Um luttøkugjald ikki er goldið tá luttakaralistin skal almannakunngerast, verður felagið strikað av luttakaralistanum.

Goldin luttøkugjøld verða ikki endurgoldin, uttan so at talan er um tekniskan feil, so sum at tann ið flutti kom til at skriva skeiva upphædd í flytingini.

## Frámeldingar

Frámeldingar skulu gerast umvegis Swimify Coach App ella við telduposti til stevnur@ssf.fo. Venjarar mugu heinta niður appina og stovna sær brúkara sjálvir.

Vegleiðing til venjara appina er at finna her. https://support.swimify.com/en-US/kb/articles/swimify-coach-app-tutorial

Feløg kunnu frítt melda svimjarar og lið frá, fram til síðstu frámeldingarfreist. Feløg kunnu eisini frítt melda svimjarar og lið frá finalu, fram til 30 min. eftir viðkomandi innleiðandi stevnupart. Frámeldingar frá finalu skulu gerast umvegis Swimify Coach App

Aftaná hetta, má felagið vísa á serliga, óvæntaða orsøk, um ikki væntandi uppmøting skal geva bót. Hesar orsakir kunnu t.d. vera brádliga íkomin sjúka, skaði, ella persónlig orsøk sum ikki ynskist lýst. Felagið skal lata stevnuleiðsluni hesa frámelding, við grundgeving um orsøk, á skrift í seinasta lagi 30 minuttir aftaná viðkomandi start.

Svimjarar sum á hendan hátt eru frámeldaðir aftaná røttu frámeldingartíð, eiga ikki longur at luttaka á stevnuni, uttan við serligari góðkenning frá stevnuleiðsluni.

Væntandi ella ikki góðtikin frámelding, viðførir bót á 500 kr pr start, eins og luttøka í kapping aftaná væntandi uppmøting altíð vil útloysa bót á 500 kr pr start í øllum tí sum viðkomandi ikki møtti til.

## Dopingeftirlit

Allar svimjistevnur undir SSF eru undir dopingeftirliti av Anti Doping Danmark (ADD), sum lýst í dopingreglugerð ÍSF: https://isf.fo/antidoping/dopingreglugerd/.

## Klagur

Møguligar klagur skulu stílast til svimjinevnd SSF, við gjaldi á kr 500 í veð.
Um klagan ikki fær viðhald, so fellur hendan trygd til SSF.
Um klagan fær viðhald, so verður hon endurgoldin.

## Beinleiðis úrslit og stroyming

Við fyrivarni fyri tekniskum trupulleikum, verða øll úrslit frá hesi stevnu at síggja beinleiðis á www.livetiming.se og live.swimify.com, eins væl og aftaná á ssf.fo og swimrankings.net
Ætlanin er eisini at stroyma frá hesi stevnu á YouTube-rásini hjá SSF

## Hugnaløta

Svimjisamband Føroya bjóðar dómarum og hjálparfólkum til smyrjibreyð og drekka í høllini, dag 2 aftaná finalurnar.

## Samband

Spurningar og viðmerkingar kunnu stílast til ssf@ssf.fo

## Gjaldsupplýsingar

Svimjisamband Føroya
P.O. Box 1329, FO-110 Tórshavn
BankNordik 6460 – 1518455
SWIFT: FIFBFOTX
IBAN: FO0764600001518455

## Kravtíðir til FM á langgeil 2026 (50m)

At klára á AQUA-góðkendari stevnu frá og við **7. juni 2025** (t.e. frá og við **FM á langgeil 2025**)

Loyvt er svimjarum ið hava klárað færri enn 3 kravtíðir, at gera eyka tilmeldingar, so at tey hava upp til 3 kappingar á 100m og styttri á stevnuni.

| Kvinnur | | Grein | Menn | |
|---|---|---|---|---|
| Langgeil | Stuttgeil | Talentnál | Langgeil | Stuttgeil |
| 00:37.57 | 00:36.39 | **50 frí** | 00:33.19 | 00:32.16 |
| 01:22.08 | 01:19.76 | **100 frí** | 01:14.46 | 01:11.33 |
| 02:59.34 | 02:55.29 | **200 frí** | 02:41.91 | 02:37.74 |
| 06:15.35 | 06:11.32 | **400 frí** | 05:49.33 | 05:36.92 |
| 12:49.55 | 12:40.90 | **800 frí** | 11:57.69 | 11:43.88 |
| 24:21.17 | 24:19.90 | **1500 frí** | 23:02.65 | 22:26.21 |
| 00:42.82 | 00:40.74 | **50 rygg** | 00:38.09 | 00:35.27 |
| 01:32.06 | 01:27.35 | **100 rygg** | 01:22.30 | 01:17.59 |
| 03:16.93 | 03:09.26 | **200 rygg** | 02:57.66 | 02:47.67 |
| 00:46.66 | 00:45.33 | **50 bringa** | 00:41.19 | 00:40.08 |
| 01:41.80 | 01:38.99 | **100 bringa** | 01:30.64 | 01:28.27 |
| 03:40.82 | 03:33.61 | **200 bringa** | 03:21.07 | 03:10.74 |
| 00:38.78 | 00:38.70 | **50 firvald** | 00:35.35 | 00:34.52 |
| 01:28.06 | 01:26.68 | **100 firvald** | 01:19.08 | 01:16.32 |
| 03:13.36 | 03:09.86 | **200 firvald** | 02:57.01 | 02:51.82 |
| 03:20.20 | 03:13.44 | **200 blandað** | 03:00.96 | 02:54.02 |
| 07:02.82 | 06:51.04 | **400 blandað** | 06:27.07 | 06:13.83 |

ATLANTIC AIRWAYS